Oljufýrtænasta í Vágum

Vágar: Shell hevur fingið mann at taka sær av oljufýrtænastuni í Vágum. Nýggi servicemaðurin byrjaði tann 1. august.

Tað er kortini ikki nøkur nýggj tænasta sum so, verður sagt av skrivstovuni hjá Oljufelagnum Shell í Havn. Oljufýrtænasta hevur leingi verið. Munurin er bara tann, at fyrr var tað maður úr Vestmanna, sum røkti Vágar. Nú býr maðurin í Vágum, og skuldi tað verið ein eyka tænasta til kundan.

Oljufýringar hava mangan tann merkiliga óvana at steðga á jólum, um vikuskiftini ella á nátt. Tá so servicemaðurin býr í Vestmanna, og ferjan er givin at sigla, kann tað vera langligt at bíða.

Nýggi servicemaðurin hevur tikið skeið í oljufýrtænastu í Danmark, og hevur síðan koyrt eina tíð við servicemonnum í Havn fyri líkasum at seta seg inn í fakið.

Av skrivstouni hjá Shell í Havn verður sagt, at felagið hevur sent húsarhaldunum í Vágum skriv um tænastuna, og at tey eisini hava fingið fleiri kundar av hesum.

ej

Góður hoyterri

Terrin hevur verið góður sum sjálvdan í summar. So góður, at onkur hevur tosað um, at tað hevur verið í so turt, so grasið er ov lítið vaksið enn. Tað er ov lítið á orsakað av turkinum, gremur onkur seg.

Men tey allarflestu, Tíðindablaðið Sosialurin hevur tosað við, eru samd um, at summarið er eitt tað besta, sum hevur verið yvirhøvur.

Tann, sum ikki fær hoyggið turt í ár, hevur ikki nógv at gera við hoyggj, halda fólk, vit hava hitt á máli.

Vestan úr Vágum frættist, at har eru fleiri soleiðis hálvliðug at hoyggja. Tað sama siga tey í Norðurstreymoy. Í Hósvík lótu tey hampiliga at mánakvøldið.

Aðrastaðni, sum til dømis á Eiði, siga fólk, at tey eru bara reiðiliga komin í gongd. Men terrin er av tí besta nú. Eitt sindur ráligt hevur verið norðanfyri, meðan landnyrðingurin var herfyri. Men tá hoyggjaðu tey aftur fyri sunnan- og vestanfyri.

Onkur er, sum er rættiliga væl við. Sosialurin hevur frætt um onkran, sum koyrir runt og pakkar gras í ballur fyri fólk. Tað sparir nógva tíð, og skal eisini vera hampiliga gott fóður, skilst.

ej

Umvæla skúlan í Leirvík

Leirvíkar Skúli stendur fyri eini umfatandi umvæling, sum fer at vara eini tveytrý ár. Takið verður skift, og skúlin skal bjálvast, allur sum hann er

EDVARD JOENSEN

Leirvík: Tað ganga nakrir hvítir menn á takinum á Leirvíkar Skúla. Á skúlaplássinum liggur byggitilfar í rúgvum. Tað er skilligt, at her fer stórarbeiði fram.

Teir eru í ferð við at taka gamla takið av skúlanum og leggja nýtt á aftur. Menninir eru klæddir eftir forskriftunum, sum Arbeiðseftirlitið krevur. Í hvítum búnum og við duskskortum fyri nøs og munn. Tí gamla takið er asbesttak, og tað er vandamikið at arbeiða við.

Í skúlagarðinum hitta vit Ólav Sjúrðarberg, skúlatjóra í Leirvík. Hann sigur, at skúlin skal hava eina rættiliga umfatandi umvæling. Hann væntar, at arbeiði fer at taka eini tvey-trý ár.

Takið var vorðið rættiliga vánaligt og mátti tí skiftast út. Valt er so at gera tað fyrst, áðrenn farið verður inn í skúlan at arbeiða. Talan er, sum sagt um asbest tak, og tað skal beinast burtur. Her ber ikki til bara at leggja nýtt omaná, sum ofta verður gjørt. Nýggja takið er av aluminium, sigur skúlastjórin.

Leirvíkar skúli er gamal. Hann er bygdur í trimum stigum. Elsti parturin, sum er tvær skúlastovur, er frá einaferð í tjúgunum, sigur Ólavur Sjúrðarberg, skúlastjóri. Síðan varð bygt upp í aftur í sekstiárunum, og tann nýggjasti parturin er frá umleið 1980.

Sum skúlastjórin sigur, varð ikki hugsað so nógv um bjálving, tá skúlin varð bygdur. Var ov kalt inni, var bara at skrúvað meira frá hitanum. Oljan var bílig, og so hugsaði eingin meira um tað. Í dag er øðrvísi. Nú verður hugsað hinvegin. Bjálvað fyri at spara olju.

Tá takið er skift, skal arbeiðast inni í skúlanum. Veggirnir eru av betong, og teir skulu bjálvast, og annars skal skúlin pussast upp, sigur skúlastjórin.

Hvussu nógv umvælingin fer at kosta, ber illa til at siga heilt neyvt enn. Men skúlastjórin væntar ikki, at tað verður niðan fyri milliónina. Bara takið man fara at tátta í ta hálvu, metir hann.

Tað eru leirvíkingar, sum gera arbeiðið.

Pumpa í brunnin

Leirvík: Eisini í Leirvík hevur turkurin gjørt vart við seg í summar. Har manglar vatn.

Lerivíkingar siga, at tað hevur at kalla ikki regnað síðan einaferð í mai. Sunnudagin kom eitt einstakt æl, men tað gjørdi hvørki til ella frá.

Seinnu tíðina hevur verið at kalla turt í vatnbrunninum. Neyðugt hevur verið at pumpað vatn haðani, tað nú einaferð er at finna.

Pumpað hevur verið við einum bensinmotori eini 14 tons um dagin. Men eisini har, teir hava fingið hetta vatnið, er turkurin farin at merkjast. Nú siga teir, at nøgdin er komin niður á átta tons dagliga, sum pumpað verða.

Leirvíksfólk meta tað mestsum vera eitt undur, at tað yvirhøvur renna átta tons av vatni nakrastaðni, nú skerpingurin hevur verið so drúgvur.

Men tað er ikki ókeypis soleiðis at pumpa við bensinmotori. Roknað verður við, at pumpað verður fyri einar túsund krónur um dagin, siga tey í Leirvík.

ej

Risa íløga á tele-økinum

Føroya Tele arbeiðir við at leggja nýggjan samsskiftiskaðal millum Føroyar og Ísland. Kostnaðurin av verkætlanini verður fleiri hundrað milliónir krónur

JÁKUP MØRK

Fyrradagin sendi Føroya Tele út tíðindaskriv, har boðað varð frá, at vegna brot á Cantat kaðalinum, sum er íbindarlið Føroya við meginlandið, fer alt telesamskifti komandi vikuna ella so fram um fylgisvein.

Trupulleikin veksur

Fyri vanligar telefonsamrøður hevur hetta kanska ikki so nógv at siga. Ljóðgóðskan versnar kanska nakað, men hetta skuldi tó verið til at liva við.

Verri er statt hjá teimum, sum í gerandisdegnum gera nýtslu av alnetinum. Kapasiteturin á linjunum er nevnliga nógv minni, tá samskiftið er um fylgisvein, enn tá talan er um ljósleiðara.

Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, sigur við Sosialin, at teir eru fullgreiðir um trupulleikan. Hann vísir á, at tá eitt líknandi brot kom á Cantat kaðalin fyri einum tveimum árum síðani, var talan eisini um ein trupulleika, men at hesin er nógvar ferðir størri í dag.

- Ferðslan á alnetinum veksur við slíkari ferð, at hon tvífaldast triðja ella fjórða hvønn mánað, og hon sær so ikki út til at minka.

Risa íløga

Sum er, er Cantat kaðalin einasta samskiftislið okkara við umheimin, tá sæð verður burtur frá samskifti um fylgisvein, og Andras Róin er eisini fullgreiður um henda trupulleika.

Hann vísir tó á, at bæði íslendingar og hetlendingar hava sama trupulleika, og at Føroya Tele í samstarvi við hesar arbeiðir við ætlanum um at leggja nýggjar kaðalar.

Fyri at betra um samskiftismøguleikarnar, er Føroya Tele farið undir fyrireikingararbeiði at leggja kaðalar fyri hundratals milliónir krónur

Ætlanirnar eru longu komnar væl ávegis, og roknað verður við, at fyrsti partur av hesum, ein kaðal millum Ísland og Føroyar, er klárur at taka í nýtslu móti ársenda 2001.

Fyrsti parturin av fyrireikingunum er longu liðugur, og er komið fram til, at kaðalin skal liggja frá Seyðisfirði til Funningsbotn, til tess at hann skal liggja so trygt sum gjørligt.

Stóri trupulleikin við Cantat kaðalinum er, at hann liggur á økjum, har nógvur fiskiskapur er, og at tað er hetta, sum er orsøkin til brotið.

At talan er um eina stóra verkætlan, framgongur eisini av teimum tølum, sum arbeitt verður við. Andras Róin sigur seg ikki kunna seta nágreinulig tøl á, men at talan er um fleiri hundrað milliónir er einki at ivast í.

Fíggjarliga byrðan av hesum verður so býtt millum samstarvsfelagarnar. Umframt Føroya Tele, er talan um Landssíma í Íslandi og British Telecon í Bretlandi. Eisini hevur oljufelagið BP víst áhuga fyri at vera við í ætlanini.

Júst hvussu fíggingarmynstrið verður, er ikki avgjørt enn, men stjórin hjá Føroya Tele vísir á, at nú talan er vorðin um kapping á teleøkinum, er ikki óhugsandi, at Føroya Tele setur á stovn eitt partafelag, har onnur so eisini hava møguleika at keypa seg inn.

Lammar samskiftið

Hjá nógvum virkjum er talan um óhepnar avleiðingar av niðursetta kapasitetinum á samskiftismøguleikunum

JÁKUP MØRK

Tá ferðslan er somikið stór, er einki at siga til, at tey virki, sum vanliga gera nýtslu av alnetinum, partvíst eru lammað.

Eitt nú fer ikki at bera til hjá ungdómum at spæla spøl á alnetinum, og hetta rakar sjálvandi tær sonevndu internet-caféirnar, sum eru í landinum. Tó fer at bera til at chatta, tá hetta fyri tað mesta koyrir innanhýsis hjá caféunum. KT fyritøkur hava trupulleikar, tá tær skulu downloada fílur av ymsum slag frá veitarum sínum, og hjá ferðamannaskrivstovunum verður talan somuleiðis um drúgvar seinkingar, tá bíleggingar av ymsum slag allar verða avgreiddar umvegis elektroniskt samskifti.

Av Føroya Tele verður sagt, at væntandi kann kaðalin takast í nýtslu aftur um eina lítla viku ella so. Hinvegin kunnu seinkingar eisini íkoma, soleiðis at arbeiðið tekur longri tíð.

Roknað verður við, at skaðin er íkomin, tí týskir trolarar hava roynt við botntroli á Rose bank við Ísland, har Cantat kaðalin liggur eftir havbotninum.

At samskiftismøguleikarnir um alnetið er verri komandi vikuna, fer eitt nú at merkjast væl á sonevndu internet-caféunum